

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 04 - 2012

# Krevur størri opinleika frá oljufeløgunum

Síðani Danmark tók við formansskapinum í ES á nýggjárinum, hevur danski vinnu- og vakstrarráðharrin, Ole Sohn, stríðst fyri at fáa nýggjar reglur, sum skulu áleggja oljufeløgum í ES at upplýsa meiri um teirra virksemi í fátækum londum. Eitt nú skulu reglurnar krevja, at oljufeløgini skulu upplýsa, hvussu nógv tey rinda í skatti og avgjøldum í teimum fátæku londunum, sum tey arbeiða í. Eitt nú hava trupulleikar verið í sambandi við oljuboringar í vesturafrikanska landinum Angola. Ein uppgerð hjá Altjóða Gjaldoyragrunninum IMF hevur víst, at síðani 2007 eru ikki minni enn 180 milliardir krónur farnar niður í lummarnar hjá landsins forseta og hansara næstu, meðan fólkið lítið og einki hevur fingið burturúr. Tað er tí ikki so løgið, at stýrið í eitt nú Angola hevur kravt, at oljufeløgini, sum virka har, skulu fjala fleiri ávís viðurskifti í roknskapinum, og tað er júst slíkum krøvum tær nýggju ES-reglurnar skulu forða, skrivar Politiken. Londini mugu ráða Menningarlandafelagsskapurin Ibis hevur lagt Mærsk undir at arbeiða ímóti størri opinleika, men í Mærsk halda tey ikki, at tey gera nakað skeivt. Felagið sigur, at tað dylur bara tað, sum hevur við oljurættindi at gera, og at útreiðslurnar til tað almenna í eitt nú Angola síggjast í roknskapinum. Í øðrum lagi heldur Mærsk, at oljulondini skulu hava rætt at áseta sínar egnu reglur. - Eftir okkara tykki ræður hvørt einstakt land fyri, hvussu tað ger sínar skattaskipanir, sigur Jesper Cramon, roknskaparleiðari hjá Maersk Oil, við Politiken.